Kanningar av sjófugli í Skúvoynni í samband við at Skúvoyggin er viðurkend sum Ramsar øki

Bergur Olsen, Havstovan, 14.05. 2018

Kanningar av sjófugli í Skúvoynni 2011-2017 í samband við at Skúvoyggin er viðurkend sum Ramsar øki

Bergur Olsen, Havstovan, 11.05. 2018

Flestu teljingar av fugli eru gjørdar í Skúvoynni, og tað er sera umráðandi at hesar teljingar koma í eina fasta legu, so tær halda fram uttan steðg, Í 2010 var eg tí á einum Ramsar fundi í Noreg og kannaði møguleikan at fáa Skúvoynna og aðrar oyggjar viðurkendar sum Ramsar øki fyri m.a.at tryggja, at fuglateljingarnar kundu halda fram og økjast. Føroyar tóku undir við Ramsar sáttmálanum longu í 1977, men vit høvu ikki útnevnt nakað Ramsar øki, sum er ein treyt fyri at vera við. Tað var stórur áhugi frá Ramsar skrivstovuni at fáa føroysku fuglabjørgini skrásett sum Ramsar øki, og tí skipaði Innlendismálaráðið fyri einum fundi í oktober 2010, saman við m.ø. formanninum í Ramsar skrivstovuni. Gjørt varð av, at søkja um at fáa Skúvoynna, Nólsoynna og Mykines viðurkendar sum Ramsar øki, tí Skúvoyggin hevði tey størstu lomvigabjørgini, meðan Nólsoyggin hevði tað størsta drunnhvítaføli, og í Mykinesi var mest av lunda. Í juli 2012 vórðu oyggjarnar góðkendar, og gjørt varð av, at Havstovan skuldi taka sær av fuglateljingum í Skúvoynni, meðan Náttúrugripasavnið skuldi taka sær av Nólsoynni og Mykinesi. Ein Ramsar verkætlan fyri hvørja av hesum oyggjunum sæst á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni www.us.fo.
Innlendismálaráðið og seinni Heilsu- og Innlendismálaráðið hava verið sera áhugað í hesum arbeiði og hava stuðlað teljingunum øll árini.

Mynd 1. Vestursíðan á Skúvoynni sæð úr báti.

Skúvoyggin, Ramsar øki nr. 2053

Skyldur
Tá ið eitt øki er góðkent, sum Ramsar øki, so fylgja treytir við, og um eitt øki ikki lýkur hesar treytir, so verður tað strikað av listanum. Hesar treytir eru t. d. at landið tryggjar eina skynsama gagnnýtslu og varðveitslu av náttúruni í Ramsar økjunum, so t.d. fuglastovnar ikki minka av mannaávum. Ramsar skrivstovan metir tí við jøvnum millumbilum, um grundgevingar framhaldandi eru fyri, at Skúvoyggin er eitt Ramsar øki. Tí verður vitanin um fuglin javnan dagførd, og fylgt verður við gongdini hjá sjófuglinum við regluligum teljingum á hvørjum ári.

Endamál
Endamálið, við hesari frágreiðingini, er at lýsa fuglakanningar, sum eru gjørdar í samband við at Skúvoyggin er viðurkend sum Ramsar øki. Harafturat verða fuglateljingarnar bornar saman við eldri teljingar í Skúgvi, fyri at meta um gongdina í sjófuglastovnunum og orsøkirnar til broytingarnar.

Bjargafuglur

Framferð tá bjargafuglurin verður taldur
Tann mesti fuglurin í Skúvoynni eigur í teimum høgu bjørgunum á vestursíðuni á oynni (sí forsíðumyndina), og størsti parturin sæst bert úr báti (Mynd 1), og her er torført at telja nágreiniliga, so tað er bara gjørt við 10 til 15 ára millumbili fyri at kanna, um stórar broytingar eru farnar fram. Ein partur sæst av eggini, men har er frástøðan niður til fuglin ov stór í flestu plássunum. Besta plássið, til at telja bjargafuglin, er Norði á Dal, har man sær út á Høvdan (mynd 2), og tí varð Høvdin valdur til eftirlitsøki longu í 1972, og tað er framvegis her, tær regluligu teljingarnar av bjargafuglinum fara fram. Veðrið er ein stórur trupulleiki, tá ið fuglurin skal teljast, og tí varð eitt lítið hús sett upp Norðuri á Dal í 2001, so til ber at kika út í Høvdan úr húsinum. Hetta hevur gjørt tað munandi lættari at telja lomvigan, og eisini gjørt tað møguligt at fara undir neyvari teljingar av ritunum og havhestunum í Høvdanum.

Mynd 2. Høvdin, sum er eftirlitsøki fyri bjargafuglin í Skúvoynni. Áðrenn 2016 varð fuglurin taldur við teleskopi, sum økir 25 ferðir, men nú verður talt eftir myndum við høgari uppleysn (sí mynd 3 og 4).

Lomvigi, rita og havhestur hava til og við 2015 verið tald við einum teleskopi, sum økir 25 ferðir, men í 2016 varð teljingin broytt, so nú verður talt eftir myndum í høgari uppleysn. Til samans verða 50 myndir tiknar av Høvdanum fyri at fáa allan fuglin við í góðari uppleysn (Mynd 3). Hesar myndir kunnu økjast, so fuglurin sæst í uppleysnini, sum er í mynd 4, sum er ein lítil partur av mynd 3.

Mynd 3. Ein av teimum 50 myndunum, sum vórðu brúktar til at telja fuglin í 2016. Myndin varð økt upp til góðskuna, sum sæst á mynd 4, meðan talt varð.

Mynd 4. Hendan myndin er ein partur av mynd 3, og hon vísir góðskuna á myndunum, sum verða brúktar at telja eftir.

Lomvigin verður taldur á hvørjari rók (spíld) sær, so til ber at síggja, hvussu talið broytist á hvørjari einstakari rók. Til samans eru gott 300 lomvigarøkur og rókarpetti, har lomvigi situr. Fyrst verður talt hvussu nógvur fuglur er á rókini til samans, og síðani verður talt, hvussu nógvir síggja út til at hava egg ella pisu (Talva 1). Pisurnar síggjast ikki, tí lomvigin stendur so tættur, og pisurnar verða vardar alla tíðina. Hendan teljingin fer fram seinast í juni og fyrst í juli, meðan fuglurin liggur á eggi ella hevur lítla pisu.

Hjá ritunum verður fylgt við, hvussu nógvar ritur og reiður eru, og hvussu nóvir ungar koma undan (verða floygdir) (Talva 1). Henan teljingin fer fram fáar dagar áðrenn ungarnir verða floygdir, og tá ber væl til at telja pisurnar. Hetta er sum oftast um 25.-30. Juli.



Havhestarnir verða skrásettir á myndir (Mynd 5), so fylgt verður við hvørjum einstøkum av teimum um 400 havhestareiðrunum, sum hava verið brúkt síðani 2001. Í juni verður mett um, hvørt havhesturin hevur egg ella ikki, og um hálvan august verður kannað eftir, um vaksin ungi er í reiðrinum (Talva 1).

Mynd 5. Skráseting av havhestareiðrum í Høvdanum.

Mynd 6. Havhestur við pisu.

Heiðafuglur

Framferð tá heiðafuglurin verður taldur
Ein partur av sjófuglinum, t.e. skúgvur, kjógvi, likka, fiskimási, svartbakur og terna eigur í haganum. Hesin fuglur hevur ikki verið taldur regluliga fyrr, men í 2010 varð farið undir at telja heiðafuglin, og hann er taldur á hvørjum ári síðani uttan í 2011. Fuglur, sum eigur í fjøruni og á helluni við sjóvarmálan er ikki taldur við. Her eigur serliga teisti, æða og skarvur.

Mynd 7. Útsyni frá Norðaraparti í Norðarahaga og suður eftir. Hegnið ímillum Norðara- og Heimarapart sæst á myndini.

Ein høvuðstreyt fyri, at arbeiðið við Ramsar ætlanini skal eydnast, er, at fólkið í Skúgvi er partur av tilgongdini og helst eisini luttekur í arbeiðinum. Tað hevur tí verið roynt at fáa fólk, sum býr í oynni, at vera við í teljingini av heiðafuglinum, men tað er trupult. Tað eru fáa fólk, sum halda seg til at telja, og tá ið veðrið er gott, hava tey nógv annað at takast við. Tað hevur tí verið neyðugt at fáa fólk aðra staðni frá at telja flestu árini.

Tað eru 5 hagapartar í Skúvoynni, og teir eru býttir upp við hegni, sum gongur tvørtur um alla oynna (Mynd 7), og innangarðs er eisini hegnað fyri seg. Hesi 6 innhegnaðu økini eru tí einastandandi at nýta í samband við teljingarnar, so skil kann haldast á, hvat er talt og ikki (Talva 1). Fýra kort eru gjørd til hvønn haga og løgd í plastikklumma, so skrivast kann á plastikklumman. Tað eru 8 fuglasløg, sum eru vanlig í haganum, og fyri at gera tað lættari, verða bara tvey fuglasløg merkt á hvørt kortið við hvør sínum liti. Gingið verður ígjøgnum hagan, so alt økið sæst. Frástøðan ímillum hvørja leið, sum verður gingin, er o.u. 100 - 300

m, alt eftir hvussu tættir fuglarnir eru, og hvussu útsýnið er. Allir fuglarnir, sum síggjast, verða skrásettir á plastikklumman. Teir fuglarnir, sum síggja út til at hava reiður, verða merktir við einum prikki fyri hvørt parið. Teir, sum ikki síggja út til at reiðrast, verða merktir við einum krossi fyri hvønn fuglin, ella við einum tali, um tað er ein flokkur. Tað verður ikki leitað eftir reiðrum, men um komið verður fram á reiður, verða egg og ungar tald.

Fuglar, sum byggja saman í bølum t.e. skúgvur, kjógvi, likka, fiskimási og terna eru lættastir at skráseta, um ein sær inn yvir økið uttan at órógva fuglarnar; t.d. um ein stendur uppi á einum heyggi við einum góðum kikara, men teir flestu fuglarnir kunnu teljast, meðan ein gongur við vanligari ferð ígjøgnum økið og skrivar á kortini so hvørt.

Úrslitini verða skrivað inn á talgild kort og kunu viðgerast í ArcMap forritinum, so til ber at knýta aðrar upplýsingar til hvørt reiðurplássið; t.d. knattstøðuna og hæddina, har tey eru skrásett.

Úrslit

Úrslitini av teljingunum av bjargafugli, skúgvi og kjógva eru víst í talvu 1 og 2.

Talva 1. Teljingar av bjarafugli í Høvdanum á Skúvoynni 2011-2017

	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Lomvigar	3863	4025	3875	2881	3418	3173	3533
Ritur	92	1027	1637	829	1666	2120	2537
Ritureiður	2790	2720	2486	2224	1961	2018	2230
Ritupisur	0	1009	427	36	114	1322	2768
Havhestar	294	315	317	370	*	*	*
Havhestareiður	222	253	268	291	*	*	*
Havhestaungar	85	101	96	137	*	*	*

*Hesi tøl verða tøk seinni í ár

Talva 2. Teljingar av skúgvi og kjógva í haganum í Skúvoynni 2012-2017

	Skúgvur		Kjógvi	
	Pør	Fuglar	Pør	Fuglar
2012	114	162	17	5
2013	190	46	40	25
2014	134	97	19	52
2015*	89	106	7	11
2016	160	171	25	22
2017	117	111	28	10

*Norðaripartur og Bergið eru ikki tald við

Fuglar, merkir her teir fuglar, sum ikki vóru í einum pari.

Umrøða av fuglateljingunum

Fyri at fáa eina fatan av gongdini í sjófuglastovnunum í Skúgvi, síðani oyggin varð viðurkend sum Ramsar øki, verða úrslitini seinastu 5 árini sett saman við eldri úrlit.



Mynd 8. Lomvigi í Høvdanum á Skúvoynni 1972-2017. Í 1975 varð ikki talt.

Lomvigin hevur verið taldur í Høvdanum síðani 1972 (1975 undantikið) og sum sæst á mynd 8, so var ein stór minking fram til 1990, og síðani vaks talið aftur fram til aldarskiftið, men so minkaði tað aftur, hóast tvey góð ár vóru í 2008 og 2009. Síðani Skúvoyggin varð viðurkend sum Ramsar øki, hevur tað verið ein lítil minking og í 2014 var talið tað lægsta tað hevur verið, men síðani er tað hækkað eitt sindur aftur.



Mynd 9. Her sæst, hvussu stórur partur av fuglinum, sum situr í berginum, bølir (hevur egg ella pisu) og hvussu stórur partur ikki bølir. Tað er serliga tann fuglurin, sum ikki bølir, sum hevur ávirkað samlaða talið mest, meðan talið á teimum, sum bøla hevur verið meira støðugt.

Um hugt verður nærri eftir gongdini seinastu 30 árini, so hevur talið á lomviga, sum hevur bølt, verið rættiliga støðugt, meðan talið á teimum, sum ikki hava bølt, hevur verið meira óstøðugt. Hetta sæst serliga um aldarskiftið, tá nógv føði var, og tí kann tað hugsast, at lomvigin situr í longri tíð í berginum, tá ið nógv føði er, og tá ið føðin er tætt við land. Seinastu 2 árini hevur nógv føði verið til bæði lunda og ritu, og helst eisini til lomviga, men sambært teljingunum, so hava tað verið færri fuglar, sum ikki hava bølt í mun til teir, sum hava bølt. Hetta kann eisini vera eitt tekin um, at fuglurin er væl fyri og at lutfallsliga nógvir hava vorpið.



Mynd 10. Her sæst, hvussu nógvir rituungar eru komnir undan fyri hvørt reiður í Høvdanum á Skúvoynni síðani 1988.

Tað hava verið sera stór sveiggj í, hvussu nógvir rituungar eru komnir undan, og støðan versnaði nógv eftir aldarskiftið, tá so gott sum ongin pisa kom undan í 6 ár á ræð. Síðani hevur verið frægari, og seinasta árið er millum fimm tey bestu seinastu 30 árini, men av tí at talið á ritum og reiðrum er minkað niður í eina helvt, so kom bara ein helvt av pisum undan í mun til 2001 (Mynd 11). Tá ið ov fáar pisur koman undan, so má stovnurin minka, og tað sæst eisini á mynd 11. Av tí at teljingin fer fram seinast í juli, so er talið á ritum tey ringu árini ikki eftirfarandi, tí riturnar rýma skjótt, eftir at pisurnar doyggja.



Mynd 11. Talið á ritum, ritureiðrum og ritupisum í Høvdanum frá 2001 til 2017. Talið á reiðrum er minkað niður í eina helvt.



Mynd 12. Talið á havhesti, reiðrum og floygdum havhestaungum frá 2001-2014. Tølini hava verið rættiliga støðugt, hóast 2007 royndist illa. Síðani hevur tað verið ein lítil framgongd.

Sjálvvirkandi fototól

Í Fagradali standa tvey sjálvvirkandi fototól, sum taka myndir av tveimum pørtum av Høvdanum hvønn dag, alt summarið. Hetta hevur verið gjørt síðani 1978 við vanligum svart hvítum filmi. Í 2008 varð tað eina fototólið skift út við eitt talgilt tól, og í 2010 varð hitt tólið eisini skift út. Myndagóðskan er munandi betur við hesum nýggju tólunum, og myndirnar kunnu økjast til 1m x 1,5m í góðari góðsku.

Mynd 13. Her verður fototólið sett í vatntætta fotokassan.

Ein mynd varð tikin hvønn tíma av hesum báðum økjunum ígjøgnum alt summarið), so her ber væl til at síggja, hvussu gekst við lomviganum og rituni alt summarið.

Mynd 14.

Mynd 15

Lundakanningar

Í Byrgisbakka, sum er stutt norðan fyri bygdina, verða royndir gjørdar við at hava eftirlit við lundunum við vakmyndatólum. 16 lundareiður eru gjørd úr plastikkrørum, og i hvørjum reiðri stendur eitt kamera við sambandi til eina teldu, sum varðveitir upptøkurnar, og seinastu tvey árini hava tær eisini verið stroymdar á heimasíðuni hjá Havstovuni. Hetta samsvarar væl við ætlanina í Ramsar sáttmálanum, har miðað verður ímóti, at almenningurin fær innlit í fuglalívið á staðnum.

Mynd 16. Mynd av telduskíggjanum skýlinum í Byrgisbakka.

Hesar upptøkur eru sera áhugaverdar, og nógvar upplýsingar kunnu fáast burturúr. Her sæst m.a. nær lundarnir verpa, og hvussu nógvir verpa. Eisini sæst, hvussu nógvar pisur koma út, og hvussu tað gongur teimum. Til ber eisini at síggja, nær pisurnar fáa eta, hvussu nogv tær fáa, og hvat tær fáa. Treytin, fyri at fáa sum mest burturúr, er tó, at peningur er til fólk at kanna upptøkurnar gjølla, men tað hava vit ikki í løtuni, so upptøkurnar verða goymdar fyribils.



Mynd 17. Gamal lundi og lundapisa, sum er klár at fara.

Í 2010 og 2011 vurpu ávikavist 7 og 8 lundar, men teir rýmdu frá eggunum áðrenn nøkur pisa kom út. Í 2012 vurpu 12 lundar, og 6 pisur komu út, men tær fyrstu 5 doyðu, tá tær vóru um eina viku gamlar. Tann 6. pisan klóraði tað, og varð floygd 12. september, sum er ein heilur mánaður seinni enn vanligt. Í 2013 vurpu 11 lundar, fýra pisur komu út, men bara ein bleiv floygd. Síðani tá hevur gingist betur og allar pisurnar eru floygdar.

Sjálv um hetta er eitt lítið tal at meta út frá, so kann sigast, at í Byrgisbakka hava seinastu trý til fýra árini verið munandi betur enn frammanundan, og 2017 er helst tað besta árið síðani 2002.

Fuglaveiða

Nógv fuglaveiða var fyrr í tíðini, bæði av lomviga, lunda, ritu og líra, men nú er tað bara lírin, sum verður veiddur, og havhestaegg verða rænd.

Líraveiða

Lírin verður veiddur um náttina, tá ið hann er um at vera floygdur, ella er nýfloygdur og situr í holumunnanum og í vøllinum uttanfyri. Við sterkum lyktum verður leitað eftir fuglunum, og teir eru lættir at taka, tá ið lýst verður á teir. Fyrr varð nógvur líri tikin, og nógvir mans gingu í fleiri dagar eftir lírum, og onki mark var fyri, hvussu nógv kundi veiðast. Vanliga varð byrjað líradag 26. august, og hildið varð á so leingi nakað var at fáa. Seinni minkaði veiðiúrtøkan, og tí varð gjørt av at seta eitt mark fyri, hvussu nógvar dagar veiðast kundi fyri at minka um veiðuna. Í fyrstani varð ásett, at veiðast kundi til 1. september, men hetta varð skjótt broytt til 5. september. Veiðitíðin er síðani blivin broytt til at vera frá 10. september til og við 16. september, tí tað varð hildið, at lírarnir vórðu seinni búnir nú enn fyrr. Nú fara teir flestu menninir bara eina ell tvær ferðir eftir lírum til húsbrúks, og veiðan er í miðal einar 50 lírar hvørja nátt.

Mynd 18. Ein partur av líraveiðini í 2017

Lundafleyg

Nógvur lundi hevur verið fleygaður í Skúgvi, og landpartur varð lagdur av til jørðina. Síðani 1995 er skrivað niður, hvussu stórur landparturin hevur verið á hvørjum ári, og sambært hesum tølum, hava stór sveiggj verið í veiðini, sum tað sæst á mynd 19. og eftir 2005 hevur so gott sum eingin veiða verið, tí so lítið av lunda hevur verið at sæð. Í 2013 varð tí gjørt av at friða lundan fram til juni 2016, og síðani er friðingin longd trý ár afturat.



Mynd 19. Samlaða veiðan av lunda í Skúgvi síðani 1995, roknað út eftir landpartinum. Lundin hevur verið friðaður síðani 2013.

Ræning

Fyrr var siður at ræna lomvigaregg á hvørjum ári, men tá ið lomvigin minkaði, so minkaði eisini áhugin fyri ræning av lomvigareggum, so ongin ræning av lomvigareggum hevur verið seinastu 20 árini, hóast møgleiki er at søkja um loyvi frá Náttúrugripasavninum. Tá ið ræningin av lomvigareggum minkaði, varð farið undir eina meira skipaða ræning av havhestaeggum, og hendan ræningin heldur fram enn, tó í minni mun enn fyrr, og bert nøkur hundrað egg verða tikin nú. Ræningarmenninir siga, at tað hevur verið ein stór minking í talinum av havhestaeggum í bjørgunum á vestursíðuni á oynni seinastu 20-30 árini.

Tøkk

Tøkk til øll, sum hava hjálpt til við teljingunum av heiðafuglinum og til Heilsu- og Innlendismálaráðið, sum hevur stuðlað kanningunum.